

# Tjóðveldi og Samband dystast í Kollafirði



Næstformenninir í Tjóðveldinum og Sambandsflokkinum bresta saman í politiskum dysti í Kollafirði í annaðkvøld klokkan 20. Tórbjørn Jacobsen og Jóhan Dahl fara at kjakast um týðandi samfelagsviðurskifti, eitt nú um vinnupolitikk, fiskivinnupolitikk, fíggjar- og búskaparpolitikk o.s.fr. Feløgini hjá flokkunum báðum í Norðstreymoy skipa fyri fundinum, sum verður í Bygdarhúsinum í Kollafirði. Tað verður samfelagsdebattørin og verkfrøðingin, Signar P. Heinesen, sum fer at stjórna teimum báðum næstformonnunum og fundinum. Í steðginum fer rockarin og troubadururin Jens Marni Hansen at spæla nøkur av sínum egnu løgum, siga Norðstreymoyar Tjóðveldisfelag og Norðstreymoyar Sambandsfelag í tíðindaskrivi.

# Páll



*Reaktiónirnar vóru ymiskar, tá fýra kommunustýrislimir á Sandi handaðu Pálli á Reynatúgvu enn eitt bræv eftir kommunustýrisfundin í gjár*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



Sandur 28-09-09

Til Páll á Reynatúgvu, Borgarstjóra

Hóast ein mánaði er farin, síðani undirritaðu sendu borgarstjóranum bræv, viðvíkjandi ónøgd okkara, við leiklut hansara sum borgarstjóri, kunnu vit staðfesta, at vit ikki hava fingið nakað formligt svar.

Vit hava tó lisið í grein í Sosialinum, at borgarstjórin ætlar at siga seg úr starvi, á næst komandi bygdarráðsfundi, sum er í dag 28 sept.

Eftir at kommunustýrisfundurin nú er liðugur, mugu vit staðfesta, at ikki er gjørt sum fráboðað. Spurningurin um borgarstjórin yvirhøvur leggur frá sær ella ikki, hongur enn sum áður í fríum lofti, ósvaraður.

Ein av síðstu døgunum uppundir kommunustýrisfundin, frættu vit í fjølmiðlunum, at borgarstjórin ikki ætlar at leggja frá sær enn. Orsøkin til hetta skal sambært honum verða, at hann bíðar eftir kanningum, sum eru ávegis, um hansara egnu embætisførslu. Um so var, at borgarstjórin VERULIGA hevði havt í hyggju, at leggja frá sær, so hevði hann havt lagt frá sær í dag. Undirritaðu meta, at hesar kanningar einans eru undanførslur, fyri at draga tíðina út, fyri síðani at enda heilt at draga í land, hetta tí at Páll á Reynatúgvu kann kanna embætisførslu sína, sum vanligur kommunustýrislimur, eins væl og sum sitandi borgarstjóri.

Út frá hesum meta vit, sum skrivaðu undir áheitanina á borgarstjóran, um at leggja frá sær, at borgarstjórin als ikki hevur í hyggju, at siga seg frá sum borgarstjóri.

Júst hetta við at draga tíðina út, halda vit er serstakliga óheppið og ábyrgdarleyst. Borgararnir hava eftir okkara tykki krav uppá, at vita hvussu tann politiski leikpallurin er skipaður, eftir at hava verið óskipaður í langa tíð. Fyri framman standa stórar avbjóðingar, sum krevja at fæ kommununar hevur ábyrgdarfullar umsitarar, sum krevja at tey sum fáast við millumkommunal viðurskifti søkja semjur heldur enn klandur, og sum krevja, at man er førur fyri at leggja rygg til at spara, tá raksturin er vorðin ov tungur.

Vit hava tí valt ikki at bíða longri, men taka ábyrgd her og nú, og vilja vit tí við hesum boða frá, at vit fýra Brandur Sandoy, Poul Klementsen, Eyðvarur Petersen og Fríði Nolsøe, hava tikið okkum saman í valbólk. Um so borgarstjórin, tá hann einaferð er liðugur at kanna seg sjálvan, finnur tað fyri gott, at gera sum fráboðað, og lata sessin frá sær, so mugu vit taka støðu til tað tá.

Somuleiðis boða vit frá, at vit vilja hava eyka kommunustýrisfund, helst í hesi vikuni, har val av nevndum verður á skrá.

Brandur Sandoy

Eyðvarur Petersen

Fríði Nolsøe

Poul Klementsen

*Hetta bræv varð handað Pálli á Reynatúgvu, borgarstjóra, og hinum kommunustýrislimunum á Sandi í gjár. Undirskrivað hava Brandur Sandoy, Eyðvarur Petersen, Fríði Nolsøe og Poul Klementsen*

# Borgarstjórin gevur fundarboð

Sambært kommunustýrislógini hava teir fýra rætt at biðja um fund, tí teir eru meira enn ein triðingur av kommunustýrinum, men teir kunnu ikki avgera, nær fundurin verður.
Sambært kommunustýrislógini er tað nevniliga bert borgarstjórin, sum kann avgera, nær fundir eru. Og sambært skrivaranum hjá Sands kommunu er onki í kommunustýrisskipanini á Sandi, sum gevur vanligum kommunustýrislimum rætt at dagfesta ein fund.

Hinvegin hava teir fýra sambært kommunustýrislógini rætt at krevja, at mál verða tikin á skrá. Ella orðarætt hevur borgarstjórin skyldu til at seta mál á skrá, sum kommunustýrislimir ynskja, síðan er tað upp til kommunustýrið at avgera, hvørt málið verður tikið til viðgerar.

Páll á Reynatúgvu, borgarstjóri á Sandi, vil ikki gera viðmerkingar til málið, og greiddi í gjár frá, at hetta er so nýtt. Tí ber ikki til at siga, nær ella hvar fundurin verður, har mál um nevndarval verður á skrá.

-eij